Steypaupphiting

Tann 14. juni er EB/Streymur partur av finaluni í kappingini um Løgmanssteypið, og longu nú boðar felagið frá, hvussu upphitingin til hetta fer fram. Ársins fjeppari hjá felagnum, Rógvi Dam, hevur nevnliga boðið øllum EB/Streyma-viðahldsfólki í bowling-høllina á finaludegnum. Dyrnar í bowling-høllini lata upp klokkan 16, og so skuldi verið góður møguleiki hjá fjepparum at fáa sær røttu litirnar og heit stemmubond undan sjálvum dystinum.

Kvinnurnar venja aftur

Sophus Dal-Christiansen, landsliðsvenjari hjá hondbóltskvinnunum, hevur longu tann 14. juni sína fyrstu landsliðssamling í nýggja kappingarárinum. Umframt venjing, so verður talan her um eftirmeting av Challenge Trophy-kappingini, sum kvinnulandsliðið var partur av um mánaðarskifti mars/apríl.

B71-Víkingur 0-5 (0-2):

B71-hýrurin í botni

B71

Víkingur

Í dystinum, har B71 skuldi reisa seg, fekk liðið størsta avsmurningin á árinum, og nú er liðið heilt illa spert í botninum

FÓTBÓLTUR

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

- Hetta var nokk at raka botnin. Nú kann tað bara ganga betur.

B71-málverjin, Símun Rógvi Hansen, hevði ikki tey vøkru orðini frammi, tá hann tosaði um dystin á Sandi í gjár.

Fimm ferðir noyddist hann í málið eftir bóltinum, og sjálvur krógvaði hann ikki, at talan var um ein kollektivar off-day hjá liðnum.

- Tað var galið kring allan vøllin. Víkingur vinnur allar nærdystirnar, og tí koma vit ongantíð av álvara inn í dystinum, segði málverjin, tá hann var á tráðnum hjá 3. hálvleiki á Rás2 í gjárkvøldið.

Víkingaveitsla

Hinvegin var talan um sanna málveitslu hjá vitjandi víkingunum.

Fyrra hálvleik var kanska ikki tað heilt stóra, sum skilti báðar partarnar, og tað var hampuliga langt ímillum uppløgdu málmøguleikarnar.

Tað eydnaðist tó Sølva Vatnhamar at seta hol á við framúr góðum langskoti, og tá Andreas Lava Olsen nakað seinni økti til 2-0, mundu tey fæstu rokna við, at B71 skuldi koma aftur í dystin.

Heimaliðið spenti tó bogan hart eftir steðgin. Og fyrsta góða korterið ella so høvdu teir nógv spæl á hálvuni hjá gestunum. Men sum tað so ofta er sætt, so kostaði hetta í verjupartinum. Og tá Sølvi Vatnhamar skoraði sítt næsta mál, fór luftin púrasta úr vertunum. Magnus Skoralíð økti til 4-0. Wellington fekk reytt kort í tí, sum líktist berari frustratión, og so kundi innskifti Martin Olsen staðfesta eyðmýkingina við fimta málinum í dystinum.

Í botni

Leikliga er einki at ivast í, at hetta var tað lægsta, sum B71 hevur rakt í ár. Verri er tó, at hóast spælið fleiri ferðir hevur verið á heilt góðari leið, so hevur úrtøkan als ikki staðið mát, og nú fer lykkjan av álvara at strammast um hálsin.

Munurin upp til niðurflytingarstrikuna øktist aftur hesaferð, og við einum triðingi av kappingini aftan fyri bak, verður tað nú tungt hjá liðnum at lyfta seg aftur. Ikki minst, tá hugt verður eftir skránni, har oddaliðini bæði, HB og EB/Streymur, eru næstu mótstøðuliðini hjá B71.

Hjá víkingunum er lagið hinvegin nakað væl betri. Ikki minst mundi tað kennast væl hjá forsprákarunum fyri samanleggingini, at fýra av teimum fimm málskjúttunum hesa ferð vóru leirvíkingar. Enn er liðið »bara« miðskeiðis á talvuni, men næsta umfar skulu teir spæla móti B36, og í so máta kann talan væl gerast um lyklauppgerð.



Víkingarnir høvdu nógv at fegnast um, tá teir mikukvøldið tóku land á Sandoynni

Dómarabókin

Feløg	GK	RK	Stig
ÍF	24	3	33
B71	17	3	26
KÍ	15	1	18
B36	18	0	18
B68	17	0	17
Skála	17	0	17
Víkingur	17	0	17
EB/S	12	1	15
NSÍ	14	0	14
HB	11	0	11

Spælarar				
Símin Hansen	B71	1	2	7
Alexander Jovevic	ÍF	0	2	6
Balazs Sinko	ÍF	2	1	5
Vali Miela	Skála	5	0	5
Hans Jørgen Djurhuus	Víkingur	5	0	5
Wellington Soares	B71	1	1	4
Rodrigo	KÍ	1	1	4
Gudmund Nielsen	B71	4	0	4
Bartal Eliasen	ÍF	4	0	4
Høgni Madsen	ÍF	4	0	4

I yvirlitinum telur gult kort 1 stig. Reytt kort telur 3 stig

Máltindurin

Formula-deildin		
Arnbjørn Hansen	EB/S	8
Christian Høgni Jacobsen	HB	7
Andrew av Fløtum	HB	6
Hans Pauli Samuelsen	EB/S	5
Rodrigo	KÍ	5
Andreas Lava Olsen	Víkingur	5
Bartal Eliasen	ÍF	4
Jann Ingi Petersen	B68	3
Sasa Jovanovic	ÍF	3
Jónhard Fredriksberg	NSÍ	3
Óli Hansen	NSÍ	3
Øssur Dalbúð	NSÍ	3
Obele Okeke Onyebuchi	Skála	3

Besti málskjúttin í Formula-deildini fær eftir kappingarárið gylta skógvin frá Thomas Dam Ítrótti

Formula-deildin

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 EB/S	9	7	-	2	-	0	21	8	13	23
2 HB	9	5	-	3	-	1	20	6	14	18
3 B36	9	4	-	4	-	1	11	5	6	16
4 Víkingur	9	3	-	3	-	3	16	11	5	12
5 NSÍ	9	3	-	3	-	3	11	13	-2	12
6 B68	9	3	-	2	-	4	8	12	-4	11
7 KÍ	9	2	-	4	-	3	13	17	-4	10
8 ÍF	9	3	-	1	-	5	14	19	-5	10
9 Skála	9	1	-	3	-	5	7	18	-11	6
10 B71	9	1	-	1	-	7	8	20	-12	4